Vit eru partur av BirdLife International

Tórshavn, 13.11.2025

Føroya Fuglafrøðifelag

Hoyringsskriv viðvíkjandi

Uppskoti til Suðuroyartunnilin

Suðuroyartunnilin er størsta verkætlan, sum nakrantíð er løgd fram í Føroyum. Tað er eingin ivi um, at tað eru nógv viðurskifti, sum skulu umrøðast, útgreinast og leggjast til rættis til eina slíka verkætlan, so sum tekniskir møguleikar, búskapur og trygd. Hetta kann síggjast í teimum 37 fylgiskjølum, sum liggja í uppskotinum til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin. Hóast nógv fylgiskjøl eru, so er lítið um týðuligu ávirkanina á náttúruna og náttúruumhvørvi. Fylgiskjal 23 snýr seg í almennum høpi um Skúvoy sum Ramsar øki. Einasti ítøkiligu upplýsningarnar í Fylgiskjal 23 eru, at Umhvørvisstovan ikki kann taka støðu til ítøkilig mál, og at Ramsar økið kann gerast minni ella møguliga strikast. Tað er tíverri ein álvarsligur og harmligur veikleiki í føroyskari lóggávu, at náttúra og umhvørvi koma síðst í tilgongdini at leggja til rættis eina verkætlan, sum ávirkar føroysku náttúruna. Tá byggiarbeiðið fyrst er farið í gongd, og stórir pengar longu eru brúktir, hava føroyskir politikarar ilt við at siga nei og steðga verkætlanini – hóast hon, stig fyri stig, oyðileggur sjálvt grundarlagið undir tí grønu Føroyum. Vit vilja minna á, at Føroyar hava bundið seg til burðardygga menningarmálini hjá ST, harav nummar 2 snýr seg um matvørur og landbúnað (https://sdg.hagstova.fo/sdg-site/2/), nummar 12 snýr seg um burðardygga nýtslu og framleiðslu (https://sdg.hagstova.fo/sdg-síða/12/), og nummar 15 snýr seg um lív á landi (https://sdg.hagstova.fo/sdg-síða/15/). Soleiðis sum henda verkætlanin nú er planløgd, førir hon Føroyar stigvíst burtur frá hesum málum.

Linjuføringin í værkætlanini vísir nýbygging av vegum og rundkoyringum á bæði Sandoynni og Suðuroynni, breiðkan av verandi vegum á Sandoynni, umframt tunnlar gjøgnum Sandalíð (1,1 km), sjálvan Suðuroyartunnilin (uml. 22,7 km), Sandvík-Hvalba (2,4km), og avgreiningin til Skúvoy (umleið 1,5 km).

Her verður viðgjørt tað, sum viðvíkur náttúruni, náttúruumsiting og lívinum í náttúruni. Tað er eingin ivi um, at tunnilin Sandoy - Skúvoy - Suðuroy fer at ávirka náttúruumhvørvið rundan um tey trý tunnilsopini. Týdningarmestu broytingarnar eru, at nýggir og breiðari vegir verða gjørdir, og at stórar grótnøgdir skulu nýtast.

Varðveisla av gróti

Landsverk hevur í síni forkanning, fleiri uppskot um, hvussu tær stóru grótrúgvurnar kunnu nýtast til ymiskar verkætlanir (Fylgiskjal 13, s. 50-56), men eingin av hesum verkætlanum er viðgjørd, so frætt sum Føroya Fuglafrøðifelag kennur til. Tí heldur Føroya Fuglafrøðifelag at tað er stórur vandi fyri, at meginparturin av grótrúgvuni frá tunnilinum verður lagdur í náttúruna, har Djúpidalur er ein møguleiki ("Ætlanin er, at grótið úr Suðuroyartunlinum, ið kemur út á Sandoynni, skal tyrnast í Djúpadali." Úrstak frá fylgiskjali 2, s. 12). Talan er um stórar nøgdir av gróti, men tølini eru ymisk alt eftir hvørjum fylgiskjølum verður hugt eftir. Í viðmerkinginum til uppskotið er rokna við uml. 2 milliónir m^3 av gróti úr Suðuroyartunlinum (s. 24). Harumframt koma grótrúgvurnar úr tunlinum gjøgnum Sandalíð (1,1 km) og tunlinum millum Sandvík og Hvalba (2,4 km). Kanningin hjá Landsverki vísir eina nøgd á umleið 3,5 milliónir m^3 til yvir 5 milliónir m^3 (Fylgiskjal 13, Talva 19). 5

milliónir m^3 svarar til, at øll Sandsbygd er undirgrava av einum góðum 20 m tjúkkum lagi av grót og steini, ella einum 35 m tjúkkum lagi at dekka Stóravatn.

Brúka vit varligari tøl um 1 million m^3 av gróti, sum verður lagt í Djúpadali á dyrkaða økið, sum hoyrir til býlingin Djúpadali, so er dyrkaða økið niðanfyri dagsins veg til Skarvanes umleið 26.000 m^2 mált við Kortal (www.kortal.fo). Hetta merkir, at grasfløturnar verða klæddar við einum 38,5 m tjúkkum steinlagi. Sera avmarkað plass er millum tunnilsmunnan í Djúpadali og markið á IBA-økinum. Vit loyva okkum at halda, at skal P/F Suðuroyartunnilin goyma grótmassuna tætt við tunnilsmunnan í Djúpadali, so mugu teir inn á IBA-økið.

Skal eisini borast úr Skúvoy, mugu grótrúgvurnar leggjast onkrastaðni á oynni. Hetta skal javnvigast við støðuna hjá Skúvoy sum Ramsar øki (sí niðanfyri). Av tí at havnin á Skúvoynni skal byggjast út fyri at fáa útgerð og maskinur til Skúvoyar áðrenn tunnilsarbeiðið byrjar frá Skúvoyar síðuni, er sannlíkt, at grótrúgvurnar frá einum grótbroti noyðast at brúkast til havnabyggingina, uttan at tað er greitt, hvaðani hetta kemur frá.

Vandin fyri dálking frá grótrúgvunum broytist um boring ella spreinging verður vald sum arbeiðsháttur. Við spreinging fara leivdinar at innihalda kemisk evni frá spreingievninum (í høvuðsheitum nitrogenbindingar) sum til endans kunnu leka út úr gróthópunum, og kunnu elva til ovurtaðing (eutrofikatión), sum kann ávirka støðuna á t.d Stóravatni. Tað er eisini væl kent frá havnarútbyggingini í Havn, at plastspreingirestir verða funnin í spreingimassunum, og at hesi kunnu dálka nærumhvørvið.

Tað kann tykjast, sum um fleiri ítøkiligar ætlanir eru um at gagnnýta grótrúgvurnar á Suðuroynni, og tí er minni vandi enn á Sandoynni, serliga um grótið kann flytast beinleiðis til tey støð, har ætlanin er at gagnnýta tað uttan at lagra grótið.

Óansæð um spreinging ella boring verður valt, so verður nakað av grótinum knúst til fínar partiklar. Partiklarnar kunnu renna frá grótinum av regni og vindið. Í ringasta føri kunnu partiklarnir førast út í Stóravatn og dekka partar av botninum, og harvið ávirka botndjóralívið og fiskalívið har.

Umráðandi er, at staðsetingin av gróthópinum verður gjørd soleiðis, at tað hevur minst møguliga ávirkan á áir og vøtn í økinum, har hópurin eru settur. Vit hava ikki funnið nágreiniliga lýsingar um, hvar í Djúpadali gróthópurin er ætlaður at liggja, men tað tykist rættiliga sannlíkt, at stórar grótrúgvur kundu verið lagdar á økið millum Stóravatn og Lítlavatn fyri at avmarka flutningskostnaðin. Líkamikið hvør linjuføring verður vald, er tað ikki ráðiligt at leggja stórar grótmassar i Djúpadali. Hetta er eisini umrøtt niðanfyri í IBA-partinum.

So vítt vit duga at síggja, eru ongar upplýsingar um byggiøkini í Djúpadali ella í Sandvík, og tað ber tí ikki til at gera viðmerkingar til hesi. Vit vilja gita at í Djúpadali fara ætlanirnar við byggiøkinum at fevna um tað eitt sindur flatara økið norðanfyri Djúpadali oman móti Drettheyggjum. Hetta liggur innan fyri mørkini hjá IBA-økinum sum er umrøtt niðanfyri.

Vit eru partur av BirdLife International

Skúvoy sum Ramsar øki

Eftir linjuføringar ætlanini, skal Skúvoyggin eisini bindast uppí fyri at lækka byggitíðina og at hava eitt býggipláss til tunnilin, samstundis verður skriva í fylgiskjalið 27:
"Byggeplads i Skúvoy har sine helt egne udfordringer i og med, at der er tale om særlig natur og at øen er udnævnt som en Ramsar ø. Som beskrevet i afsnittet om arbejdsplads i Skúvoy, vil anlægsarbejdet kræve en stor del af arealet mellem åen i bygden og kirkegården."

Øll Skúvoy er Ramsar øki, tað vil siga at øll oyggin er partur av "Ramsar Convention on Wetlands of International Importance Especially as Waterfowl Habitat", tað eru útvald umráðir sum eru altjóða týdningmikil fyri plantur og djór, í hesum føri fyri fuglar sum halda til á oyggini, so sum; lomvigar, ritur, havhestar, lundar, drunnhvítar, skrápar, kjógvar, skúgvar og onnur sløg.

Lond, ið hava góðtikið Ramsar-sáttmálan, skulu umsita síni Ramsar-øki soleiðis, at økini halda sín ekologiska dám og varðveita sínar týdningarmestu funksjónir og virðir fyri komandi ættarlið.

Tær ætlanir, sum eru lagdar fram vilja elva til at nátturan á Skúvoyggini verður álvarsliga ávirka fram við eystursíðuna, frá áini til kirkjugarðin sunnanfyri og helst eisini eitt stórt umráði rundan um. Alt øki her skal nýtast til arbeiðisumráði, tað vil siga til at hava pláss til arbeiðsfólk og til goymslu av tólum og tilfari, sum skal brúkast til at gera tunnilin og at føra tað burtur úr tunnilinum, her til skal eisini byggjast út av kaikantinum so at skipsferðsla við tilfari og arbeiðsfólki kann lættari sleppa at arbeiðsøkinum. Afturat hesum skal ein goymsla gerast til spreingievnir sum ikki er set í ætlanina, men má eitt annað stað, vekk frá fólkið og arbeiðsumráðinum.

Øll ljóð og ljós dálkingin, hækkaða virksemi og tungaferðslan, bæði á landi og sjógvi kemur at ávirka fuglalívið á oyggini neiligani, bæði undir byggini og helst eisini eftir byggingina.

Í mun til alternativu farleiðina, sum ikki á sama hátt ger seg inn á hetta økið, so fer hendan verkætlanin at hava stórar avleiðingar fyri økið.


Týdningarmikið fuglaøki (Important Bird Areas, IBA)
Vit vita, at ein røð av ferðafólkum hava náttúruna í Føroyum sum høvuðsorsøk til at vitja okkum. Nógv av hesum ferðafólkum eru fuglaáhugaði, og tey vitja øki við serligum náttúruligum virðum so sum ávís fuglasløg, slagssamansetingar, ella samansetingar av virðum, ið hava stóran týdning fyri náttúruumhvørvið og djórasløg.

Í 2000 tilnevndi BirdLife International 19 týðandi fuglaøki (IBA) kring Føroyar. 18 av hesum fevna um fuglabjørgini og brattu klettastrondinar kring ymsu oyggjarnar, eitt nú Sandoynna og Skúvoynna. Stovnanin av føroysku IBA-unum byggir á dátur, sum Bergur Olsen og Dorete Bloch og starvsfelagar hava savnað inn. Vit halda, at landsfuglateljingin, sum varð gjørd í 1981, er eitt týðandi grundarlag undir hesum dátum (Bloch, 1981). Føroysku dáturnar eru tiknar saman í Grimmet og Jones (1989).

Tað er vælkent, at Sandoyggin er ein fuglarík oyggj. Fuglarnir eru tó ikki javnt býttir um alla Sandoynna. Tað eru avgjørt øki, sum eru virðismiklari enn onnur. Av føroysku IBA-unum er bara

"Vøtnini á Sandoynni" sum fevnir um landøkið og sum eru lætt atkomuligt. "Vøtnini á Sandoy" er býtt í tveir partar, ein partur fevnir um økið kring Stóravatn og Lítlavatn, og ein størri partur fevnir um økið eystan úr Sandsvatni yvir Gróthúsvatn, og víðari úteftir móti Søltuvík og Sølthøvda (sí kort). Báðir hesir partar eru nú undir hørðum trýsti, og verandi lógaruppskot um Suðuroyartunnilin rakar báðar partar av "Vøtnini á Sandoynni". Tvs okkara einasta IBA-øki á landi í Føroyum. Í økinum vestanfyri og sunnanfyri Sandsvatn verður nýggjur vegur og tvær rundkoyringar gjørdar, umframt útbygging av verandi vegi. Hetta ávirkar besta landbúnaðarøkið í Føroyum eisini er nógv brúkt av fugli.

Vit hava eitt gott yvirlit yvir fuglarnar í og kring Sandsvatn umvegis altjóða dátugrunnin eBird (www.ebird.org) har sjálvboðin úr øllum heiminum lata sínar eygleiðingar av fuglum inn. Per í dag (05.11.2025) hava 35 fólk latið inn tilsamans 140 eygleiðingarlistar, sum fevna um Sandsvatn og nærumhvørvið kring Sandsvatn. Eygleiðingarlistarnir eru býttir út yvir flestu vikurnar í árinum og eru savnaðir seinastu 10 árini, tað er sjálvandi ikki tann fulla myndin av vitjandi fólkið og fugli í økinum. Tilsamans hava 97 sløg verið eygleidd í og kring Sandsvatn. Eygleiðingarnar eru av staðbundnum og ferðandi gæs, (serliga grágás og bramgás, men eisini íslandsgás og onnur sløg av gæs) í stórum tali, og antarfuglar (ennigúl ont, villdunna, krikkont og onnur), ið beita á graslendinum kring Sandsvatn (og Gróthúsvatn). Soleiðis gera eisini støðu og ferðandi vaðfuglar (sum tjaldur, spógvi, fjallmurra, mýrisnípa, stór svarthálsa, reyðspógvi, tangspógvi og onnur). Nógv sjáldsom fuglasløg hava verið eygleidd kring og í Sandsvatni. Bara í 2025 hevur verið eygleitt kápureyð ont, silkihegri, kápugrælingur, reyðgrælingur, herfugur og sjógvhøna.



Vit eru partur av BirdLife International

Kort yvir IBA-økið "Vøtnini á Sandoynni". Tað fevnir um økini millum Stóravatn og Lítlavatn suður til býlingin Djúpadals, umframt økini kring Sandsvatn, Gróthúsvatn og vestureftir móti Søltuvík/Sølthøvdi.

Tað slagið av landbúnaði, sum verður framt kring Sandsvatn, hevur eina minimala negativa ávirkan, men heldur eina jaliga ávirkan, á fuglalívið í økinum, serliga hjá gæs og plantuetandi antarfugli, umframt vaðfugli, sum ofta leita sær føði í haga og graslendi.

Lítið av nýggjum dátum eru fyri lendið í Stóravatn/Lítlavatnsøkinum. Fyri sjálvt Stóravatn og økini beint rundan um tað eru nøkur data, men nógv minni (30 eygleiðingarlistar frá 16 fólkum) enn fyri økið við Sandsvatn. Hesar eygleiðingar vóru helst mest gjørdar frá verandi parkeringsplássi í landsynningshorninum av Stóravatni, har sera gott útsýni er yvir sjálvt vatnið. Per í dag (05.11.2025) eru 41 fuglasløg skrásett í og kring Stóravatn. Vit vilja gjarna trúgva, at tað faktiskt eru nógv fleiri sløg, sum eru at finna í økinum ella, sum vitja tað á ferðing. Ongar økiseygleiðingar hava verið millum Stóravatn og Lítlavatn, sum hava verið førdar inn í eBird, og vit mugu tí líta á tær dátur, sum eru samantiknar í Grimmet og Jones (1989) sum vísa á ein høgan tættleika av vaðfugli (tjaldur, hagalógv, spógvi, stelkur, helsareyði), umframt eitt av fáu økjunum, har øsreyður lómur javnan reiðrast.

Økta bilferðslan í sær sjálvum fer sannlíkt ikki at hava stórvegis ávirkan á flestu fuglasløg í økinum, tí nógvar fuglasløg reagera lítið uppá bilar. Óansæð verður nakað av ávirkan av øktari dálking, vegabreiðing, og broytingum í vatnveitingini og avløpinum í økinum. Størsta ávirkanin kemur frá grótplássunum. Verða hesi sett á óhepnan hátt í økinum, kunnu tey ávirka bæði fuglalívið og fagurfrøðiligu/sjónligu náttúruvirðini í økinum.

Niðurstøða

A. Báðir partar av IBA "Vøtnini á Sandoynni" eru undir hørðum trýsti frá fleiri síðum og verkætlanum. Um ein ella fleiri av hesum verkætlanum verða settar í verk, noyðist BirdLife International at umhugsa av nýggjum, um "Vøtnini á Sandoynni" kvalifiserar seg til IBA-støðu.

B. Fleiri av teimum trupulleikum og oyðileggingum, sum ætlaða farleiðin elvir til, kundu lættliga verið sloppin undan við at byrja tunnilin norðan fyri Sandsbygdina.

C. Tað eru fleiri viðurskifti viðvíkjandi Suðuroyartunlinum, sum ikki hevur nóg nógvar upplýsingar um í lógaruppskotinum og í fylgiskjølunum, og tað ger, at tað ikki ber til at gera skilagóðum viðmerkingar til tey.

Tilvísingar

Bloch, D. (1981) Fugletelling på Færøerne sommeren 1981 - foreløbig rapport. Dansk Ornitologisk Tidsskrift 75, 1-6.

Grimmet RFA, Jones TA (1989) Important Bird Areas in Europe. Faroe Islands. ICBP Technical Publication No. 9, International Council for Bird Preservation, Cambridge, UK. Pages 137-144.

Kibblewhite MG (2018) Contamination of agricultural soil by urban and peri.urban highways: An overlooked priority? Environmental Pollution 242, 1331-1336.

Muthu M, Gopal J, Kim DH, Sivesan I (2021) Reviewing the impact of vehicular pollution on road-side plants - future perspectives. Sustainability 13, 5114.

Petit C, Aubry C, Rémy-Hall E (2011) Agriculture and proximity to roads: How should farmers and retailers adapt? Examples from the Ile-de-France region. Land Use Policy 28, 867-876.

Phillips BB, Bullock JM, Osborne JL, Gaston KJ (2021) Spatial extent of road pollution: A national analysis. Science of the Total Environment 773, 145589.